handVERKARIN

2. ÁRSFJÓRÐINGUR 2008 BLAÐ NR. 26 HAVNAR HANDVERKARAFELAG

Tryggast við fastari flyting

Allir limir, sum ikki eru í eftirstøðu við limagjaldi, eru lívstryggjaðir.
Lívstryggingin er ein umfatandi trygging. Sum dømi kunnu vit her nevna:
• Útgjald við deyða til avvarðandi.
• Útgjald, tá limur gerst 67 ár.
• Útgjald til eina langa rød av hættisligum sjúkum.

Tá børn hjá limi gerast sjúk
Lívstryggingin er eisini galdandi fyri børn hjá limi; tó við teirri avmarking, at tey skulu vera ímillum 6 mánaðir og 18 ára gomul.
Tá børn hjá limi gerast sjúk fevnir tryggingin um hesar sjúkur:
• Eykvæmi, HIV-ígerð av blóðflutningi,
• Nýrasvignab,
• Meningitis,
• Illkynjaðar krabbameinssjúkur,
• Blindni (aldursavmarking: ár >2 og <18)
• Deyvleiki (aldursavmarking: ár >2 og <18)

Umfatandi lívstrygging
Av tí at lívstryggingin er so umfatandi fáa vit ikki nevnt alt her. Men limir kunnu altíð venda sær til skrivstovu felagsins, og fáa ein faldara sendan við nágreiniligari frágreiðing um allar smálutir í lívstryggingini.

Av tí, at tryggingin ikki er galdandi, tá limur er í eftirstøðu, kann hetta fáa sera óhepnar fylgjur.

Tí heita vit á teir limir, sum enn ikki hava stovnað eina sjálvvirkandi flyting, um at fáa tað gjørt. Hetta kann gerast á hendan hátt: Næstu ferð tygum móttaka rokning fyri mánaðargjald, skulu tygum undirskriva rokningina, lata hana til tygara peningastovn, sum síðani syrgir fyri, at rokningin verður goldin og, at tygum verða tilmeldaður sjálvvirkandi flyting. Lætt og einfalt. Lívstryggingin er partur av limagjaldinum, sum er 450,- kr. um mánaðin. Limirnir eru sjálvandi altíð vælkomnir at venda sær til skrivstovuna í hesum sambandi.

Innihald

Tryggast við fastari flyting 2
Felagið skipar fyri burturluting 3
Pólland: Agnieszka trívist væl í Føroyum 4
Pólland: Landbúnaðurin er í menning 8
Pólland: Ídnaðurin nýtímansgjørdur 9
Pólland: Tá ið póllendingar beindu fyri kommunismuni 18

Útgevari: Havnar Handverkarafelag • Sjúrðargøta 20 • Box 203 • 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Avgreiðsla: Yrkadagar frá kl. 9 til 12 • Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

Felagið skipar fyri burturluting

Havnar Handverkarafelag hevur altíð lagt dent á at veita limunum so góða tænastu sum gjørligt.

Nú hevur felagið sett sær fyri at fáa uppaftur betur samskifti við limirnar umvegis teldupost.

Sum øll vita so er teldupostur ein sera góður samskiftismiðil. Tí verður fyrsta stigið at fáa so nógvar limir sum gjørligt at senda felagnum ein teldupost.

Tað einasta, sum skal standa í teldupostinum er: Fornavn, eftirnavn, arbeiðspláss (meistari) og møguligt fartelefonnummar.

Telduposturin – við upplýsingum – skal sendast til: limir@handverk.fo

Fyri at gera hetta meira áhugavert hjá limunum skipar felagið fyri burturluting av einum Ipod fyri hvørjar 50 limir, sum senda teldupost við omanfyri nevndu upplýsingum.

Tað vil siga, at fáa vit t.d. 100 teldupostar, so kasta vit lut um tveir Ipod, og fáa vit t.d. 1000, so kasta vit lut um 20 Ipod.

Fyri at vera við í dráttinum skal telduposturin vera hjá felagnum í seinasta lagi 1. oktober 2008.

Summarfrí

Vegna summarfrí er ongin avgreiðsla á skrivstovu felagsins í viku 30, 31, 32 og 33.

Avgreiðsla er aftur sum vanligt 18. august 2008. Eru átrokandi boð kann ringjast til formannin, telefon: 23 48 02.

Arbeiðsloysi í Evropa

Kortið vísir, hvussu stórt arbeiðsloysi er í ES-londunum og, at ofta er stórur munur á arbeiðsloysinum í landspørtunum. Vit síggja, at arbeiðsloysið í Norðurfinnlandi er meira enn 13.45%, meðan tað í Suðurfinnlandi er niðanfyri 4,75. Áleið tað sama kann sigast um munin millum Eystur- og Vesturtýskland.

Harafturímóti er arbeiðsloysið í Póllandi javnt stórt; omanfyri 13.45%.



Agnieszka trívist væl í Føroyum

Agnieszka er fødd og uppvaksin í Póllandi. Hon kom fyrstu ferð til Føroya í 1988. Hon dámar væl Føroyar og føroyingar, sigur hon, men tað kann vera eitt sindur kalt og myrkt um veturin, leggur hon so afturat.

Eg haldi eg má fortelja, hvussu tað bar til, at eg kom til Føroya, sigur hon so. Tað er ein heldur sjáldsom søga. At eg eri her, kann eg takka einum pólskum lækna fyri. Tað sjáldsama er, at hann hevur ongantíð verið í Føroyum. Men hann hevði arbeitt sum lækni í Svøríki. Har hevði hann hoyrt um Føroyar og, at tað var lætt at fáa arbeiði í Føroyum. Og lønin var góð, eftir pólskum málistokki, segði hann.

Eg visti onki um Føroyar, men fekk blóð uppá tonnina, og hevði hug at royna eydnuna.

Hetta var í 1988, og tá var støðan í Póllandi alt annað enn góð. Lønirnar vóru sera vánaligar, og inflatiónin var stór.

Tá var heldur ikki so lætt at sleppa úr landinum, man skuldi søkja um visum, og tað kundi taka langa tíð. Eg søkti so, og tá eg hevði fingið visum, setti eg beina kós til Føroya.

Jólaódnin í 1988

Í Føroyum gekk alt skjótt fyri seg. Arbeiði var at fáa á Bacalao, ella Fiskavirking, sum tey siga nú. Har var eg reinskerari, og fekk bústað í einum kampingvogni. Og nú koma vit til tann minni góða partin av søguni. Eg kom til Føroya síðst í november, og hevði bara verið her í nakrar vikur, tá tann tiltikna jólaódnin í 1988 brast á. Tá búði eg framvegis í kampingvogninum, og tá var ikki stuttligt at búgva har. Tað leikaði so í, at eg var sannførd um, at mín síðsta løta var komin. Eg hevði ongantíð uppliva so nógvan vind fyrr, tað var stutt sagt ræðuligt. Tá sat eg har og angraði, at eg var komin til Føroya. Men eg veit ikki, tá stormurin hevði lagt seg, gav eg – tí betur – Føroyum ein tjans afturat.

Fólk søgdu eisini, at hetta var heilt óvanligt, og at tað var langt ímillum ódnirnar, so eg var verandi.

Agnieszka gift í Føroyum

Í 1990 møtti Agnieszka havnarmanninum Birgir Johannesen. Tey giftust í 1991, og eiga

Í 1991 giftust Agnieszka og Birgir Johannesen. Tey eiga tvey børn, eina dóttir og ein son.

tvey børn, eina gentu og ein drong. Gentan eitur Emma og drongurin David. Tíðin gongur skjótt, sigur Agnieszka, nú er Emma 16 ár og David 12. Og nú havi eg skjótt búð í Føroyum í 20 ár, tað er ein stórur partur av lívinum.

Stinn í Føroyskum

Í dag tosar Agnieszka flótandi føroyskt. Hon fortelur okkum, at líka síðani hon kom til Føroya hevur hon roynt at lagt seg eftir at læra føroyskt. Tað hevur verið spennandi, men tað hevur eisini tikið sína tíð. Í 1992-93 tók hon eitt kvøldskúlaskeið í føroyskum fyri útlendingar. Av tí, at ongin pólsk/føroyskt ella føroysk/pólsk orðabók er, so brúkti hon enskt sum millumlið. Tað vil siga, at hon fór frá pólskum til enskt, og so frá enskum til føroyskt, og umvent.

Hon dugdi væl enskt, tá hon kom til Føroya, og tað kom væl við, alt hevði verið nógv truplari um hon ikki dugdi enskt, sigur hon.

10. flokkur, børn og Fróðskaparsetrið

Í 2004 tók Agnieszka 10. floks prógv í føroyskum, og veturin 2005-2006 tók hon eitt skeið í føroyskum á Fróðskaparsetrinum.

Og so greiður hon okkum frá, hvussu nógv børnini hava lært hana. Tað byrjaði við, at hon lærdi seg orðini, sum hava samband við smá børn, tað var til dømis blæa, fløska, svong, sova, kukka, pissa o.s.v. Og so hvørt børnini dugdu at siga nýggj orð, so lærdi hon eisini tey.

Hjálpir fólki og er tolkur

Hóast tað eru umleið 90 póllendingar í Føroyum, so eru ikki so nógvir, sum duga so ræðið føroyskt sum Agnieszka. Tí verður hon eisini ofta spurd um hon ikki kann hjálpa, og tað ger hon fegin. Tað kemur fyri, at fólk, sum hon ikki kennir ringja til hana og spyrja um ymiskt. Og hon hevur eisini hjálpt myndugleikunum, t.d.

Frá vinstru: Beiggi Agnieszku, mamman, Agnieszka og pápin, sum doyði í 1976.

politinum, tað er mest, tá teir hava brúk fyri einum tolki.

Hon kennir eisini rættuliga nógvar av póllendingunum, sum arbeiða og búgva í Føroyum. Og tá hon møtir póllendingum, og hon hevur stundir, so plagar hon at geva sær tíð til eitt prát. Man má eisini royna at halda sítt móðurmál við líka, sigur hon.

Agnieszka er katolikkur, og er vanliga í Mariukirkjuni hvønn sunnudag. Har koma eisini aðrir póllendingar til gudstænastu. Á Tórshavnar Skipasmiðju arbeiða fleiri póllendingar, so man kann næstan siga, at har er eitt pólskt umhvørvi, sigur hon skemtandi.

Lærarastarv

Í nøkur ár hevur hon verið lærari í Adventistaskúlanum í Havn. Og hon gleðir seg serliga nógv til komandi skúlaár, tí tá skal hon vera flokslærari hjá 1. flokki. Tað verður hennara fyrsta skúlaár sum flokslærari. Hon undirvísir mest í evning, matgerð og rokning.

Her eigur at vera nevnt, at Agnieszka tók læraraprógv á universitetinum í Warszawa áðrenn hon kom til Føroya.

Hon sigur eisini, at nú er ikki tann stóri munurin á føroyskum og pólskum børnum.

Nýggja tíðin við globalisering, nógvum sjónvarpsrásum og interneti ávirkar børnini í Póllandi á sama hátt sum børnini í Føroyum.

Men alt er ikki bara gott, tað harmar hana nógv, at narkotisk evni eru vorðin meira vanlig í Póllandi.

Hetta er ein stórur trupulleiki nógvastaðni, og heilt ung gerast bundin av hesum evnum. Tað hevur eisini gjørt, at narkotisk evni verða seld og keypt í skúlunum. Tað er tí betur ikki tað sama í Føroyum.

Barnaárini

Agnieszka er uppvaksin í einum lítlum býi, sum eitur Lubien Kujawski. Tað er stutt vestanfyri Warszawa. Í dag búgva eini 1500 fólk í býnum. Býurin liggur í einum øki, sum verður nevnt Kujawy, har hava tey t.d. felags búnað, sum á ein hátt kann samanberast við føroyska tjóðarbúnan, føroysku klæðini.

Tey eru tvey systkin, hon hevur ein beiggja, sum býr í Póllandi. Pápin doyði í ungur í 1976, tá var Agnieszka 6 ára gomul. Pápin var stjóri á eini verksmiðju, sum gjørdi múrsteinar. Mamman livur enn, hon hevur einaferð verið í Føroyum og vitja. Agnieszka hevur, næstan á hvørjum ári síðani hon kom til Føroya, verið ein túr í Póllandi, tað hevur vanliga verið um summarið. Tað hevur nógv at siga fyri hana, at hon ikki missur sambandi við slekt og vinfólk í Póllandi.

Abbin og omman

Agnieszka fortelur, at tey vóru ofta hjá ommuni og abbanum, tá hon var barn. Tey høvdu eitt lítið bóndabrúk; og høvdu nógv djór: neyt, dunnur, hønur, gæs, svín og fleiri ross, men ongan seyð, sum tað er so nógv av í Føroyum. Rossini vóru arbeiðsross, tey vóru brúkt til allan flutning og tá tey veltu jørð.

Tað hava altíð verið nógv arbeiðsross í Póllandi, men tá landbúnaðurin verður moderniseraður, so verða rossini færri.

Hon minnist eisini, at øll høvdu kolovnar. Tað er nógv kol í Póllandi, og tað hevur verið nógv brúkt bæði í húsarhaldinum og í vinnulívinum, greiðir Agnieszka frá.

Hon minnist aftur á barnaárini, og fortelur, at omman og abbin høvdu ikki elveiting, og livdu tí eitt heilt annað lív, enn tað, sum hon var von við heima hjá teimum; foreldrini hava havt elveiting alt tað hon kann minnast.

Eitt sindur strangur skúli

Eg fór í skúla tá eg var 6 ár. Í dag kann man siga, at skúlin var eitt sindur strangur. Eg minnis, at ein dagin fortaldi ein lærari fyri okkum, at í morgin skulu vit fara ein túr at vitja á eini verksmiðju, sum ger múrsteinar.

Eg segði onki, men visti beina vegin, at tað mátti vera har, sum pápi mín arbeiddi.

Eg minnist væl, hvussu eg gleddi meg og, hvussu erpin eg var. Eg var so spent, at eg gloymdi, at vit skuldu skriva um tað, sum vit fingu at vita á verksmiðjuni.

So tá lærarin bað um uppgávurnar mátti eg siga, at eg hevði gloymt at skriva. Tá bleiv eg ordiliga kedd, tí eg visti, at nú fór at vera galin endi. Og rætt var.

Peikipinnurin

Eg bleiv rópt upp til læraran. Hann bað meg vísa sær vinstru hon, so tók hann peikipinnin og smekkaði hann niður í hondina. Tað sveið so øgiligt. Og tá eg setti meg aftur, minnist eg, at eg royndi at lætta um pínuna við at seta meg á hondina. Ongin bleiv sligin í høgru, tí so fekk man ikki skrivað; vit skrivaðu nógv í skúlanum.

Børnini Emma, 16 ár, og David, 12 ár, avmyndað frammanfyri leivdir, sum standa eftir av Berlinmúrinum.

Hatta minnist eg so týðuligt. Annars haldi eg, at skúlin var ikki so galin, kanska eitt sindur for strangur.

Men nú er alt øðrvísi, nú líkjast børnini og skúlarnir í Póllandi nokkso nógv teimum í Føroyum.

Landbúnaðurin er í menning

Á smærri pólsku gørðunum hava arbeiðsross framvegis stóran týdning.

Landbúnaðurin í Póllandi er einasti vinnuvegurin, sum ikki bleiv stórvegis broyttur í tiðarskeiðnum, tá kommunistiska skipanin var galdandi í Póllandi.

Tí er stórur tørvur á at nýtímansgera landbúnaðin, men bøndurnir hava lítlan hug at taka undir við broytingum. Næstan tveir triðingar av jørðini í Póllandi er landbúnaðarjørð, men jørðin er ógvuliga smábýtt. Tað eru meira enn tvær mió. privat landbrúk í Póllandi, og nógv tey flestu eru sera smá. Ein triðingur av brúkunum eru ein hektar ella minni. Ein hektar svarar nøkulunda til støddina á einum vanligum fótbóltsvølli.

38% av brúkunum liggja ímillum 1 og 5 hektarar. Og niðanfyri 5% prosent av brúkunum eru omanfyri 30 hektar.

Landbúnaður á lágum støði

Meginparturin av landbúnaðinum í Póllandi er á einum sera lágum støði, í mun til landbúnaðin í Vesturevropa.

Tey smáu brúkini eiga vanliga bøndur, sum hava tvey neyt, eitt svín og eitt ross. Harumframt hava teir flestu eisini dunnur og høsn.

Umleið 90% av teimum, sum eiga jørð, arbeiða á sínum egna garði. Tá er vanliga talan um, at kona og maður reka garðin, og hava ikki lønt fólk í arbeiði.

Tað mesta, sum verður dyrka er korn (hveiti, havri, meis, rugur), eplir, sukurrøtur, raps, kálrøtur, frukt og ymiskt grønmeti. Hóast umleið 30% av arbeiðsmegini í Póllandi starvast í landbúnaðar- og matvøruframleiðsluni, so umboðar henda vinna ikki meira enn góð 3% av bruttotjóðarframleiðsluni.

Tey størru brúkini

Men tað eru eisini størri og effektivari brúk í Póllandi. Tá er ofta talan um, at útlendskir íleggjarar hava sett pening í meira ídnaðarkendan landbúnað.

Á hesum øki hava danskir íleggjarar verið í fremstu rað. 60 danskar fyritøkur hava í felag gjørt íløgur í 25 sera stór svínahald. Talið á stórum svínagørðum er vaksið seinnu árini, og í dag eru omanfyri 18 mió. svín í Póllandi.

Mjólkarframleiðslan hevur eisini havt ein ávísan vøkstur; tað verður mett, at 19 mió. neyt eru í landinum.

Her eigur eisini at vera nevnt, at arbeiðsloysið í fleiri landbúnaðarøkjum liggur væl omanfyri 40%. Tað er sjálvsagt nógv lættari at fara undir nýggja framleiðslu í einum øki, har stór arbeiðsmegi er tøk.

Á størstu gørðunum er landbúnaðurin meira ídnaðargjørdur.

Ídnaðurin nýtímansgjørdur

Árini fram til 1989 hevði tungídnaðurin í Póllandi stóran týdning fyri landið.

Men tungídnaðurin var tá tætt knýttur, at framleiðslu av hernaðarútgerð til Sovjetsamveldið og londini í Eysturevropa.

Og tá Warzavasamgongan datt sundur í 1991, hvarv mest sum alt grundarlagið undir tungídnaðinum í Póllandi. Hetta var ein stórur smeitur fyri samfelagið, og hevði við sær, at nógv gjørdust arbeiðsleys.

Tá gjørdist neyðugt at finna aðrar marknaðir, og at nútímansgera hesa vinnu.

Effektiviseringar

Ein trupulleiki var, at tungídnaðurin kravdi ov stóra arbeiðsmegi. Tí var farið undir at effektivisera vinnuna, og bøta um góðskuna í framleiðsluni.

Í dag er hesin ídnaður nógv effektivari, og hevur tí ongar trupulleikar, tá talan er um kapping á heimsmarknaðinum.

Bilídnaðurin

Bilídnaðurin í Póllandi er ikki nýggjur, men hann er vaksin nógv seinnu árini.

Bilframleiðslan í Póllandi byrjaði í 1930' árunum, tá varð ein avtala gjørd við italsku Fiat bilverksmiðjuna.

Í dag hava fleiri av teimum heilt stóru bilfraleiðarunum verksmiðjur í Póllandi. Men Fiat er enn nógv tann stórsti. Fiat hevur gjørt íløgur fyri meira enn 10 milliardir í Póllandi.

Av øðrum kendum bilframleiðarum, sum hava gjørt íløgur í Póllandi, fara vit her at nevna General Motors.

Fleiri aðrir bilframleiðarar gera partar av teirra bilum í Póllandi.

Tá ið póllendingar beindu fyri kommunismuni

Í seinna helmingi av sjeytiárunum kom rættuligt hóttafall á búskapin í Póllandi. Í fleiri ár minkaði framleiðslan í landinum í stórum. Stjórnin royndi at loysa trupulleikan við lántøku uttanlands. Men tá støðan ikki batnaði og lánini skuldu gjaldast aftur, var úrslitið stórt vørutrot, og ovurstórur prísvøkstur.

Elektrikarin Lech Walesa, ið gjørdist forseti í Pólllandi í 1990.

Stjórnin var ikki sinnað at loyva lønarhækkingum; tað skapti stóra ónøgd í landinum, og arbeiðsfólk og lønmóttakarar fóru at skipa fyri mótmælistiltølkum og arbeiðssteðgi. Hetta vísti seg kortini ikki at hava stórvegis ávirkan á politikkin hjá pólsku stjórnini.

1. juli 1980 kunngjørdi stjórnin nýggjar matvøruprísir. Sum dømi kunnu vit nevna, at prísirnir á kjøtvørum hækkaðu 60%.

Um pólska stjórnin als ikki hevði roknað við mótmælum og verkføllum vita vit ikki, men ongin droymdi um, at júst hendan avgerðin varð byrjanin til eina rød av hendingum, sum at enda beindu fyri kommunistisku skipanini, sum tá var galdandi í londunum í Eystur Evropa.

Verkføll taka seg upp

Stutt eftir at pólska stjórnin hevði kunngjørt príshækkingarnar 1. juli 1980 gjørdu starvsfólk á eini stórari verksmiðju í Swidnik vart við seg. Afturfyri príshækkingarnar kravdu tey lønarhækkingar. Men tey vóru ikki tey einastu, ið lótu frætta frá sær. Nakrar dagar seinni løgdu arbeiðarar í býnum Lublin, og starvsfólk á traktorverksmiðjuni "Ursus", arbeiði niður. Tey kravdu eisini lønarhækkingar. Tað sama hendi nú á fleiri øðrum arbeiðsplássum í Póllandi.

Stjórnin svarar aftur

Pólska stjórnin svaraði aftur við at kunngera, at øll verkføll vóru ólóglig, og at tey, sum skipaðu fyri verkføllum fóru at vera revsað.

Fyri at gera tað greitt, at myndugleikarnir ikki fóru at ganga krøvunum á møti, var ein kvinna, sum var kranførari á skipasmiðjuni í

Gdansk, søgd úr starvi 14. august 1980. Men tað var betur ógjørt.

Fyri at vísa hesi kvinnu stuðul fóru 17.000 fólk á skipasmiðjuni í Gdansk í verkfall. Tey skipaðu eisini fyri blokadu á skipasmiðjuni, og kravdu at kvinnan fekk starvið aftur. Harumframt kravdu tey lønarhækkan, og rætt til at skipa seg í nýggj fræls fakfeløg.

Støðan gerst spent

Nú gjørdist støðan spent í Póllandi, og mong roknaðu við at stjórnin fór at lata herin leggja uppí og handtaka tey, sum skipaðu fyri.

Men av tí at stórur partur av fólkinum tók undir við krøvunum hjá arbeiðsfólkunum tordu myndugleikarnir helst ikki at leggja uppí við hermegi.

Stutt eftir varð skipað fyri fleiri tiltøkum á teimum stóru arbeiðsplássunum í Norður Póllandi. Eisini kravdu tey, at kvinnan í Gdansk, skuldi fáa starvið aftur.

Verkfalsfelagskapir

Nú fóru arbeiðsfólk at skipa seg í verkfalsfelagsskapir, og søktu sær stuðul frá útbúgvingarstovnum og pólsku kirkjuni, sum var sterk í Póllandi.

Nógv arbeiðsfólk ymsastaðni í Póllandi tóku seg nú saman og mótmæltu. Høvuðskravið var at fáa rætt til at skipa seg í nýggj fræls fakfeløg. Tey kravdu eisini verkfalsrætt, talufrælsi, bannlýsing av sensuri og avtøku av serrættindunum hjá teimum, sum vóru limir í kommunistaflokkinum. Harumframt kravdu tey at sleppa at siga sína hugsan í útvarpi og sjónvarpi.

Skipasmiðjan í Gdansk

Stórur partur av teimum, sum gingu á odda í stríðnum vóru arbeiðsfólk og handverkarar á skipasmiðjuni í Gdansk, sum varð nevnd Leninskipasmiðjan. Har arbeiddu u.l. 17.000 fólk. Teirra millum var elektrikarin Lech Walesa, sum seinni gjørdist forseti í Póllandi.

Av tí at tíðindi um tiltøkini og støðuna sum heild, vóru borin fram í útvarpi og sjónvarpi um allan heim, var pólska stjórnin undir stórum trýsti.

Skriftin á vegginum

Pólska stjórnin dugdi nú at síggja skriftina á vegginum, og boðaði 31. august 1980 frá, at hon var sinna at samráðast um krøvini.

Stjórnin boðaði eisini frá, at hon fór at loyva verandi fakfeløgum at fara í verkfall. Harumframt segði stjórnin, at hon fór at loyva nýggjum frælsum fakfeløgum og, at hon fór at taka av allan sensur.

Fakfeløgini fóru nú til samráðingar við stjórnina, og tá stjórnin kravdi, at varðveita allar aðrar myndugleikar hjá kommunistaflokkinum eftirlíkaðu fakfeløgini.

Ein nýggj vón

Hetta var ein stórur lætti, sum merktist um alt landið. Støðan hevði verið sera spent, og nógv vóru farin at óttast fyri, at alt fór at enda í einum blóðbaði.

Nú var aftur skapt ein vón í pólska fólkinum um, at friður fór at valda í landinum og, at samfelagið aftur fór at vera merkt av framburði.

Tíðindini um nýggju støðuna í Póllandi vóru borin fram um allan heim.

Solidaritet verður stovnað

22. september 1980 møttust umboð fyri 36 ymiskar fakfelagsskapir til fundar á Leninskipasmiðjuni í Gdansk. Tá var m.a. gjørt av at stovna eitt stórt breitt fakfelag við umboðum úr øllum landinum. Hetta var fyrsta frælsa fakfelagið í Eysturevropa eftir seinna heimsbardaga.

Í Norðurlondum hevur felagið verið nevnt Solidateritet; sum er ein umseting av pólska navninum Solidarnosci.

Elektrikarin Lech Valesa

Á hesum fundi varð 37 ára gamli elektrikarin, Lech Valesa, sum arbeiddi á skipasmiðjuni í Gdansk, valdur til at standa á odda fyri Solidaritet.

Men hetta var ikki nøkur løtt uppgáva. Landið var sera illa fyri fíggjarliga við ovurstórari

Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo

SPEKT stataut.revisorar Spf.
spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35
Heiðavegur 15 · Postsmoga190 · 600 Saltangará · Tel 474 474 · Faks 474 475

SPEKT

statsaut.
revisorar

Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

...húsavarðaarbeiði
...alt snikkara- og timburarbeiði
...umvælingar
...sethúsabygging

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

Húsavarðartænastan

Ognað tær tín egna húsavorð

Málarameistararnir
FALKENBERG
Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny

FØROYA BETONGSAGING Sp/f
www.betongsaging.fo
Føroya Betongsaging Sp/f · FO-620 Runavík · Faroe Islands
Tel: +298 44 75 43 · Mob: +298 21 75 43 · Fax: +298 44 88 98
E-mail: betongsaging@betongsaging.fo

uttanlandsskuld, ógvusligari inflatión og stórum troti á m.a. matvørum.

Tí var ein ávísur vandi fyri, at valdsharrarnir fóru at beina fyri Lech Walesa. Men hann hevði dirvi sum fáur, og gjørdist sonn fólkahetja í Póllandi. Um hetta mundi vórðu tíðindi úr Póllandi dagliga borin fram í øllum fjølmiðlum, og navnið Lech Walesa gjørdist kent um allan heim.

Stjórnin noydd til samstarv

Nú hevði Solidaritet so stóra undirtøku í fólkinum, at pólska stjórnin helst hevur mett, at hon var noydd at samstarva við felagið. At síggja til gjørdist Solidaritet sterkari fyri hvønn dag sum gekk. Fólk nærum kappaðust um at lima seg inn í nýggja fakfelagið, og vónaðu, at tað fór at gera mun. Limatalið vaks við rúkandi ferð, og í 1981 fór limatalið upp um 9,5 mió.

Aðrir bólkar taka stig

Eisini aðrir bólkar í samfelagnum fóru undir at stovna felagsskapir eftir sama leisti sum Solidatet. Hetta vóru serliga fólk, sum arbeiddu í landbúnaðinum, og á hægri læristovnum. Tey tóku eisini upp samstarv við katólsku kirkjuna.

Tey gomlu fakfeløgini, sum kommunistaflokkurin hevði ræði á, mistu – so at siga – alla undirtøku.

Solidaritet krevur góðkenning

Solidaritet setti eisini fram krøv um juridiska góðkenning, og tá felagið ótolnaðist eftir at fáa hetta kunngjørt, varð á heysti 1980 skipað fyri einum landsumfatandi verkfalli. Hetta gjørdi mun, og 10. november 1980 varð Solidaritet góðkent av ovasta dómstólinum í landinum.

Listafólk eisini betri umstøður

Tað at Solidaritet vann sær so nógv rættindi fekk ávirkan á onnur viðurskifti í samfelagnum. Eisini listafólk, sum høvdu verið undir eftirliti tordu nú betur at gera vart við seg. Her kunnu vit nevna, at filmsleikstjórin, Andrzej Wajda, gjørdi ein film, sum beinrakið lýsti stóra munin millum ideologi og veruleika. Hesin filmurin gjørdist kendur, og vann eina stóra virðisløn á kendu filmsstevnuni í Cannes.

Krøv frá Solidaritet

Solidaritet fór nú at krevja demokratiskar broytingar á fleiri økjum.

Nøkur av krøvunum vóru:

- Talifrælsið skuldi verjast
- Tey sum arbeiddu sum leiðarar hjá kommunistaflokkinum skuldu góðkennast av starvsfólkunum
- Allir borgarar skuldu hava atgongd til skjøl, sum høvdu samfelagsligan týdning
- Fíggjarligar avgerðir, sum lógu hjá kommunistaflokkinum, skuldu flytast til virkini og parlamentið at taka støðu til
- Yvirskipaðar avgerðir skuldu takast í parlamentinum, meðan virkini sjálvi skuldu gera raðfestingar
- Búskaparliga umsitingin hjá kommunistaflokkinum skuldi ikki broytast til kapitalistiskan marknaðarbúskap, men broytast soleiðis, at arbeiðsfólkið hevði ræðið. Henda skipanin skuldi tryggja eina javnvág millum markaðarkreftir og demokrati
- Leiðandi myndugleikin hjá kommunistaflokkinum skuldi ikki broytast

Í 1978 varð pólskur biskuppur valdur til páva. Hann fekk sær pávanavnið Johannes Paul 2, og fekk stóra ávirkan á gongdina í Póllandi. Á myndini hittir Lech Valesa pávan.

Kommunistaflokkurin

Eftir stuttari tíð hevði kommunistaflokkurin mist meginpartin av tí myndugleika, sum hann hevði haft, og fólk í hópatali søgdu limaskap sín í flokkinum upp.

Leiðslan í flokkinum sat ráðaleys, og hevði ilt við at semjast og taka avgerðir.

Pólland var merkt av áhaldandi verkføllum, og kaos valdaði á fleiri økjum. Samstundis vuksu stóru búskaparligu trupulleikarnir í landinum. Framleiðslan fall og uttanlandsskuldin fór at vaksa við rúkandi ferð. Hetta vóru so álvarsamir trupulleikar, at tað tyktist ómøguligt at loysa teir við verandi samfelagsskipan.

Nýggjur aðalskrivari

5. september 1981 legði aðalskrivarin í kommunistaflokkinum, Edward Gierek, frá sær. Aðalskrivarin hevði hægsta og máttmiklasta starv í landinum, og tí vakti tað ans, tá tann ókendi og púra óroyndi Stanislaw Kania, varð valdur til aðalskrivara. Floksleiðslan var ráðaleys og kendi seg kroysta at samstarva við Solidaritet um allar samfelagsligar spurningar.

Í eini slíkari støðu var sannlíkt, at politiski myndugleikin fór at leita sær hjálp hjá hermegini, og harvið tryggja kommunistaflokkinum valdið aftur í landinum. Ein annar møguleiki var, at Sovjet fór at leggja uppí við hermegi. Her eigur at vera nevnt, at í 1968 var ein líknandi støða í Tjekkoslovakia. Tá legði Sovejt uppí og bardi alla mótstøðu niður. Hetta gjørdi pólska stjórnin eisini vart við, tá hon samráddist við Solidaritet.

Men tá Lech Walesa varð spurdur, um hann ikki bar ótta fyri at Sovjet fór at leggja uppí, svaraði hann konsekvent, at tað var ikki annað enn psykologisk krígsførsla, sum ein sperdur kommunistaflokkur droymdi um.

Kongress í oktober 1981

Á eini kongress hjá Solidaritet í oktober 1981 kravdu fleiri fundarluttakarar, at farið varð undir at skipa fyri einum demokratiskum vali til pólska parlamenti. Fleiri onnur krøv um størri demokrati vóru eisini sett fram, men Lech Walesa og, nógv við honum, tóku ikki undir við hesum uppskotum. Lech Walesa ivaðist ikki, hann førdi fram, at tað hevði nógv størri týdning at arbeiða fyri rættindunum og

æruni hjá arbeiðandi fólkinum í landinum.

Solidaritet tyktist kortini ikki at hava innanhýsis trupulleikar, felagsskapurin vísti seg at vera demokratiskur, og hevði framvegis vaksandi undirtøku. Í oktober 1981 fór limatalið upp um 10 mió.

Støðan gerst spentari

Tá verjumálaráðharrin Wojciech Jaruzelski, 9. februar 1981, gjørdist forsætisráðharri var lítið hugsað um, at tað fór at hava avgerandi týdning fyri politisku gongdina, og truplu støðuna í Póllandi. Jaruzelski hevði annars eina fortíð sum generalur í Polska herinum.

Tað sum meira varð hugsað um í hesum sambandi var, at ein kendur liberalur politikkari, Mieczyslaw Rakowski, varð valdur til verjumálaráðharra, tá Jaruzelski gjørdist forsætisráðharri.

Undantakstøða

Men á heysti 1981 hendi so tað, sum ikki lá fremst í huganum hjá fólki. Tá boðaði Jaruzelski stjórn síni frá, at nú mátti hart setast ímóti hørðum. Hóast hann dugdi at síggja, at kommunistaflokkurin var so mikið veikur, at hann ikki kundi fáa nakran avgerandi leiklut í eini uppgerð við Solidaritet, so metti hann, at stjórnin kundi líta á hermegina, sum taldi 320.000 menn. Harumframt hevði hann undir sær eitt serligt trygdarherlið við 77.000 monnum og servandar deildir við 18.000 monnum. Allar hesar deildir kundu setast inn, tá rætta løtan var komin.

Jaruzelski verður aðalskrivari

Fyri at tryggja sær vald á øllum økjum varð Jaruzelski, 18. oktober 1981, valdur til aðalskrivara í kommunistaflokkinum. Nú lá alt vald í hondunum á einum manni, sum bara bíðaði eftir røttu løtuni.

Í fyrireikingunum vóru herdeildir settar at hava eftirlit við tí, sum fyrifórst um alt landið. Alment varð boðað frá, at hetta vóru herdeildir, sum skuldu hjálpa fólki nú støðan var vorðin so trupul í landinum. Men veruligu ørindini vóru at savna allar týðandi upplýsingar saman, sum tørvur var á, tá uppgerðin við Solidaritet skuldi takast.

Wojciech Jaruzelski, forsætisráðharri og fyrrverandi generalur, lýsti krígsrættarstøðu í landinum 13. desember 1981. Men tað eydnaðist honum ikki at vinna á Solidaritet.

Krígsrættarstøða

13. desember 1981 boðaði Jaruzelski almenninginum frá, at nú valdaði krígsrættarstøðu í landinum. Stutt eftir varð kunngjørt, at Solidaritet var ein ólógligur felagsskapur. 6000 fólk, sum høvdu verið virkin í felagsskapinum, vóru handtikin. Teirra millum Lech Walesa. Nøvnini á teimum, sum vórðu handtikin, vóru øll á einum lista, sum var gjørdur í góðari tíð áðrenn krígsrættarstøðan varð lýst.

Øll tíðindatænasta var sett undir sensur, verkføll vóru forboðin, alt telesamskifti í land-

inum varð sett undir eftirlit, og herurin var settur at hava eftirlit við verksmiðjunum og øðrum arbeiðsplássum. Útgonguforboð varð lýst og nógvar herdeildin vóru at síggja í gøtunum.

Men hermegin møtti ikki stórari mótstøðu. Dømi vóru um lokala mótstøðu, sum skjótt varð bard niður. Einasta mótstøðan, sum hevði týdning, varð framd av kolanámsarbeiðarum í Katowice, og kostaði 9 arbeiðarum lívið.

Ymsar áskoðanir

Tá tíðindi frættust, sendu flest øll lond í vesturheiminum pólsku stjórnini mótmæli. Og sum vænta fekk pólska stjórnin stuðulsfráboðan úr Sovjetsamveldinum. Tað sama gjørdu grannalondini Tjekkoslovakia og Eystur Týskland. Grannalondini mettu helst, at truplleikarnir, sum pólska stjórnin hevði av Solidaritet kundu breiða seg, sum ein smitta, til øll londini í Eystur Evropa. Hesin illgruni og ótti gjørdist nøkur fá ár seinni veruleiki.

Fakfelagsleiðarar verða fongslaðir

Krígsrættarstøðan rakti Solidaritet meint. Øll leiðslan varð fongslað, og ongin tordi at seta seg upp ímóti hervaldinum.

Stjórnin boðaði frá, at tað var virksemi hjá Solidaritet, sum var orsøkin til ringa standin í landinum. Og helst vóru eisini fólk, sum høvdu hug at geva Solidaritet skyldina fyri ringu støðuna, sum landið var komið í.

Hóast hetta, so eydnaðist at fáa í lag loyniligt samstarv millum fólk, sum høvdu stuðla Solidaritet. Talan var m.a. um útgávu av bókum, og faldarum, men talan var eisini um ólógligar útvarpssendingar, sum stuðlaðu Solidaritet.

Fleiri tíðindafólk rýmdu úr almennu fjølmiðlunum, og fóru í staðin at hjálpa andstøðuni við ólógligum útvarpssendingum og blaðútgávu.

Kirkjan og Pávin

Sum áður nevnt so er katólska kirkjan sera sterk í Póllandi. Ein av orsøkunum til hesa støðu var, at sitandi pávin í Rom var Póllendingur, og tá hann vitjaði í heimlandinum í juni 1983 gjørdi hann vart við, at fólki í landinum átti rætt til at skipa seg í óheft fakfeløg.

Á tann hátt skiltu øll, at katólska kirkjan

mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
SENDISTOVAN
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo

FØROYA GASSØLA
Veitari av gasstøkni og útbúnaði
AGA
bp
ESAB
Føroya Gassøla • Akranesgøta 2 • Tórshavn • Tel 31 55 44, Fax 31 17 06

www.euronom.se EURONOM

Hiti úr náttúruni

FlexiFuel er ein av heimsins bestu upphitingarskipanum til hús

Við FlexiFuel skipanini ber til at kombinera eina ella fleiri orkukeldur

Ársins Annlegg! Svenska Solarkuf felagið

ExoSol OPC

Vakumrør sólfangari. Ókeypis orku meginpartin av árinum! Nýggi vakumrørsólfangarin EU21 við innbygdum sólkyknum, framleiðir el til sirkulatiónspumpuna, sum sjálv regulerar maximumnýtsluna.

ExoAir

Rustfrí luft-/vatnpumpa. Gevur hita niður á - 25° og heitt vatn upp til +60°. Fekk gullheiðursløn á „Eneo Energie" størstu orkumessuni í Fraklandi í 2007.

ExoFlame

Brenniovnur, ið eisini kann bindast í tangan.

Exo Tangi VPS

Euronom Flexi Fuel er ein av heimsins bestu Agenda 21-upphitingarskipanum til hita í húsum. Hjartað í skipanini Exo Tank VPS, verður settur til sólfangarar, hitapumpur, oljufýr ella ta orkukeldu, mann frammanundan hevur. Við Flexi Fuel-skipanini kann mann velja at brúka ta upphitingarskipanina, sum mann ynskir, alt eftir hvat er biligari.

foroyaprent.fo

hiti
Alt rør og sanitet arbeiði verður gjørt

FlexiFuel

Stoffalág 33 · Tórshavn · tel. 315008 · fax 315009 · hiti@post.olivant.fo · www.hiti.fo

SKIPASMIÐJAN

www.faroeyard.fo

alka

einføld trygging

ALKA - Engelholm Allé 1 - Hoje Taastrup - 2630 Taastrup - Danmark

XL BYG. Balslev.fo

www.balslev.fo

Ídnaðar- og garaguhurðar

Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

Undir tørtarum arbeiðsumstaðum, bæði líkamliga og figgjarliga, er gott at sleppa undan kiksarum.

VARTA Semi-Traktion akkumulatorar eru gjørdir til tey serligu arbeiðsvíðurskiftini á sjónum.
Ti brúka fleiri og fleiri fiskifar VARTA akkumulatorar há fremsta akkumulatorframleiðara í Evropa.

Setiðtryggina í høsanið
Nýtið VARTA Semi-Traktion ella Super Heavy Duty akkumulatorar - eisini nøstu ferð.

Battaríir Til Øll Endamál

Fartelifonir

Hoyri Apparatir

Ur og mangt annað

Eisini hava vit øll vanlig battaríir

Heil- og smásøla, landsins bestu battaríir, og landsins bestu prísir

PÓLAR

Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60

elmek

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo

Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl

DELL HEWLETT PACKARD SONY Canon

Meir enn bert ein telda

iMac hevur alt, sum ein telda skal hava, har dygd og vakurleiki semjast í einum ótrúliga lekkrum og hugvekjandi sniði. Við iMac verður smákeðiliga skriviborðið ein spennandi prýðislutur.

12.490,-

SENDISTOVAN

NEMA

city
www.city.fo

Tórshavn • Klaksvík • Saltangará
347 300 347 310 347 320

hevði valt síðu. At kirkjan hevði tikið røttu avgerðina sást aftur til gudstænasturnar. Kirkjan gjørdist ein miðdepil, sum meginparturin av fólkinum savnaðist um. Á tann hátt takkaði fólkið eisini kirkjuni fyri støðuna, sum hon hevði valt. Men kirkjan gjørdi eisini greitt, at hon ikki stuðlaði valdsnýtslu. Mælt var til dialog, og kirkjuleiðarar mintu á, at borgarakríggj ongantíð hevði verið í Póllandi, og at tað var umráðandi at halda fast um. Tá støðan í landinum var ótrygg, kom kirkjan at standa sum ein tryggleiki, sum fólkið savnaðist um. Tey ungu góvu eisini kirkjuni ans. Tøl hjá kirkjuni vísa, at í 1981 gingu 32% av teimum ungu í kirkju. Hetta tal var í 1986 66%.

Ongin bati í samfelagnum

Hóast stjórnin hevði stóra hermegi, tanks og vatnkanónir, so vann hon sær ikki undirtøku í fólkinum. Helst hevur stjórnin sett sítt álit á, at tað fór at bera til at endurreisa kommunistaflokkin, og fáa fólkið at taka undir við flokkinum. Men hetta eydnaðist ikki. Fólkið hevði onki álit á flokkinum og limatalið minkaði.

Fólk flest valdu at liva eitt friðarligt lív við umsorgan fyri familjuni, og vístu lítlan ella ongan áhuga fyri almennum tiltøkum. Ongi tekin vóru um batar í samfelagnum; gerandisdagurin í Póllandi var merktur av vørutroti og prísvøkstri. Við eini slíkari gongd, gjørdist støðan hjá hernaðarstýrinum púra vónleys.

Walesa verður leyslatin

Í apríl 1982 kom vend í. Tað merktist, at stjórnin hevði hug at koma á tal við partar av andstøðuni og vanliga borgaran. Og í november 1982 varð Lech Walesa leyslatin. Hetta kundi ikki sigast at vera annað enn ein sigur hjá andstøðuni.

Støðan hjá kommunistaflokkin gjørdist bara alsamt verri, og limaskarin var vorðin so mikið lítil, at stjórnin helst hevur ásannað, at grundarlagið undir flokkinum var um at hvørva. Støðan hjá stjórnini var løst føst, og juli 1983 varð kunngjørt, at krígsrættarstøðan var sett úr gildi. Men herurin var kortini enn á varðhaldi, og tí var ikki møguligt at skipa fyri fundum og verkføllum.

Stjórnin royndi at seta tiltøk í verk fyri at bøta um búskapin, men gongdin var hin sama; búskapurin viknaði, vørutrotið bara øktist og inflatiónin vaks.

Frá 1980 til 1982 minkaði bruttotjóðarúrtøkan við 25 prosentum. Hesa tíðina gjørdust øll í Póllandi fátækari – summi nógv fátækari enn onnur.

Broytingar í Sovjet

Meðan ongin glotti var at hóma í Póllandi, vóru tekin um broytingar í Sovjet. Tað gjørdist reiðiliga greitt, tá Mikhail Gorbatjov í 1985 varð valdur til aðalskrivara í kommunistaflokkinum í Sovjet.

Í juli 1988 var Mikhail Gorbatjov á vitjan í Póllandi. Tá gjørdi hann í eini røðu greitt, at Pólland hevði allan rætt til sjálvt at ráða yvir síni egnu lagnu.

Hetta vóru greið boð úr Sovjet, sum øll

Tað er eitt spæl at keypa ferðina á netinum...

Tað er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways.
Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil.
Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.

Tel 34 10 10 · Fax 34 10 01

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo

200 kr
FRÆLSI
GOYM FRÆLSI
SAVNA KEYLUR
kall
GOYM FRÆLSI
TÍTT GJALDOYRA
Hvør keyla hevur virði á 15 kr. og kann nýtast sum gjaldoyra á hesum støðum:
Kall handilin í SMS
Kall handilin á Óðinshædd
Kall handilin í Saltangará
Kall handilin í Klaksvík
City
Expert
Burger King
Williams
Sunset Boulevard
Pizza 67 í Tórshavn
Pizza 67 í Klaksvík
Trend Floor í Saltangará
Rafik'sa í Saltangará
J.A.P í Klaksvík
Fyri 5 keylur fært tú
eitt ókeypis atgongumerki til biografin
Fyri 6 keylur fært tú
ein ókeypis bowlingtíma
Tilboðið er galdandi til 1. juni 2008
kall
20 20 20

tóku í álvara. Tað er onki at ivast í, at støðan hjá Gorbatjov hevði stóra ávirkan á pólsku stjórnini. Og nú var eisini vorðið greitt, at pólska stjórnin ikki kundi ræða við einari Sovjetiskari innrás. Tað skálkaskjólið hevði Mikhail Gorbatjov beint av vegnum.

Aftur til samráðingar

Tá Mikhail Gorbatjov hevði boðað frá síni støðu, fekk andstøðan aftur dirvi til at skipa fyri tiltøkum. Hetta gav stjórnini nýggjar trupulleikar, og øll dugdu at síggja, at hetta fór at fáa avleiðingar.

26. august 1988 setti innanríkisráðharrin seg í samband við umboð fyri andstøðuni, og boðaði frá, at stjórnin ynskti at koma á tal við andstøðuna um støðuna í landinum. Tað nýggja í hesum var, at nú setti stjórnin ikki krøv ella treytir til andstøðuna. So nú varð lagt upp til at finna eina loysn í felag. Hesum tók andstøðan undir við, og farið var undir eina drúgva gongd, sum endaði við semju um eina nýggja stýrisskipan, ið varð kunngjørd 5. apríl 1988.

Parlament, senat og forseti

Sambært nýggju stýrisskipanini skuldi eitt parlament veljast við 460 limum, og eitt senat við 100 limum.

Semja var um, at kommunistaflokkurin skuldi hava eina serstøðu til fyrsta valið, sum varð hildið 4. juli 1989.

Úrslitið gjørdist ein stórsigur fyri Solidaritet, andstøðan fekk 92 av 100 sessum í Senatinum. Og Tadeusz Mazowiecki, valevni hjá Solidaritet, gjørdist fyrsti fólkavaldi stjórnarleiðarin í Eystur Evropa eftir seinna heimsbardaga. Sum krúnan á verkinum gjørdist elektrikarin, Lech Walesa, í 1990 forseti Póllands. Men hansara politiska kariera í forsetasessinum var stutt.

Á forsetavalinum í 1995 vann Aleksander Kwasniewski á Lech Walesa.

Kwasniewski hevði eina fortíð í gamla

rør-tænastan
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión
Eyðfinn Hansen
í Geilini 5
FO-175 Kirkjubøur
Faroe Islands
tel./fax: +298 32 81 80
fartel.: +298 22 81 80
e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo

Bíligari Betri Beinleiðis

Endamál felagsins er at kunna selja eina fyrstafloks vøru til ein bíligan penga!

import.fo

Klædningurrin frá okkum er viðlíkahaldsfríur og hevur allar teir fyrimunirnir, sum træi hevur, men uttan vansarnar – sum gjørdur til føroyska veðurlagið!

Vit kunna bjóða vindeygu og hurðar framleid úr plast, træ, mahogny, eik og alu-træ. Vit hava, stutt sagt: »vindeygu, tær tørvar, fyri pris, tú ynskir!« Nøgd, snið og stødd eftir tygara ynski, einki er standard.



Skotarók 3 · Box 3070 · FO-110 Tórshavn · tel: 321 521 · import@import.fo · www.import.fo

Tú ert handverkarin!

... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín

Vit kunnu bjóða
- spennandi arbeiðsuppgávur
- ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
- starvsfólkamenning
- trivnað

Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv

LM ELECTRIC

Hoyviksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo

LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice

Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20

Tú og e – vinna hvørja ferð!

Eik Banki P/F er e kortútgevari

www.ekort.fo

BAXI KETIL

BALTIC CS
18-25Kw

Sera orkusparandi ketil frá BAXI.

CE góðkendir.
DS/ISO 9001 góðkendir.

Við kappa til oljufýr

Ein tann mest orku-sparandi ketil á føroyska marknaðinum.

Síggj kanningina á www.sparolie.dk

Tórshavn:
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
tel 30 93 10 - fax 30 93 11

Vágur:
Á Marknoyri
tel 37 35 35 - fax 37 35 65

demich

kommunistaflokkinum. Somu menn stríddust tá ímóti hvørjum øðrum: Kwasniewski í kommunistaflokkinum og Walesa í Solidaritet. Hetta var lagnunnar speisemi.

Nýggja tíðin

Hóast Pólland nú var farið inn í eina nýggja tíð, og hevði fingið eina politiska skipan, sum var meinlík teirri, ið var galdandi í londunum í Vestur Evropa, so vóru stóru samfelagsligu trupulleikar ikki vorðnir lættari at loysa.

Tiltøkini, sum nýggja stjórnin setti í verk, elvdu m.a. til ovurstórt arbeiðsloysi, serliga har eysturi í landinum

Hetta var ikki høvuðstrupulleikin, tá kommunistarnir høvdu buktina og báðar endarnar. Stóra arbeiðsloysið elvdi til nógvan ófrið, og politiskan ruðuleika í Póllandi.

Í 1991 vóru ikki minni enn 29 politiskir flokkar umboðaðir í parlamentinum.

Eitt sum skapti trupulleikar var, at fleiri av leiðarunum – í gamla kommunistaflokkinum – stillaðu upp fyri aðrar flokkar, og vóru valdir í nýggja parlamentið. Og tá farið var undir at einskilja vinnulívið høvdu teir lætt spæl og keyptu stórar ognir fyri ein bíligan penga.

Hetta er ein av orsøkunum til, at stórur partur av pólska fólkinum hevur mist áhugan fyri politikki. Mong av teimum, sum væntaðu, at nýggja politiska skipanini fór at gera gerandisdagin hjá pólska fólkinum lættari, eru í dag vónbrotin. Hetta er serliga galdandi fyri tann eldra partin av fólkinum, og verður mett at vera høvuðsorsøkin til, at valluttøkuprosentið til tey seinastu politisku valini í Póllandi hevur ligið millum 40 og 50%.

At enda skal vera nevnt, at í 1999 gjørdist Pólland limur í Nato, og í 2003 fekk landið limaskap í ES.



Arbeiðsloysið í Póllandi

Nýggja vesturlendska stýrisskipanin, sum var sett í gildið í Pólandi í 1988, og stóru privatiseringarnar, sum fylgdu í kjalarvørrinum, høvdu við sær eitt stórt arbeiðsloysi, sum var púra ókent í Póllandi frammanundan. Í tíðarskeiðnum 1990 -1994 tók arbeiðsloysið rættuligt dik á seg; tað fór úr 9% í 1990, og upp í 17% í 1994.

Árini 1994-1998 minkaði arbeiðsloysið nakað, men fór so aftur at vaksa, og kom í 2003 upp í 20%. Her er talan um miðalarbeiðsloysi. Í fleiri pørtum av landinum røkk arbeiðsloysið – hetta tíðarskeiðið – heilt upp í 44%.

Í 1994 fekk Póland nýggjar avtalur um ovurstóru uttanlandsskuldina. Størsti parturin av uttanlandsskuldini var lán, sum vóru tikin í Vesturevropa; her møtti Póland stórari vælvild; umleið helmingurin av skuldini var strikað.

Nógvir póllendingar arbeiða í dag í øðrum londum. Hetta hevur stóran búskaparligan týdning fyri landið.

Í dag búgva omanfyri 38 mió. fólk Póllandi.

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

- ✓ Handverksútbúgvingar
- ✓ Støðisútbúgving
- ✓ Yrkisakademiútbúgvingar
- ✓ Skúlaheim

Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051

www.tst.fo • tst@tst.fo

Saman við okkum røkkur tú longri

FØROYABANKI

Sum hollur viðleikari í vinnulívinum hevur Føroya Banki kunnleika og kapasitet til at fremja møguleikarnar í tíni fyritøku.

Í 100 ár hevur Føroya Banki vegleitt og fíggjað føroyskt vinnulív í góðum sum ringum. Hesa tíðina hava Føroyar verið fyri ovurstórari menning, og vit tora at siga, at Føroya Banki hevur verið ein týðandi partur av gongdini. Hesi 100 árini hava lært okkum nógv, og vit eru klár til meira.

SENDISTOVAN

www.foroya.fo